vodafone deildin

# Víkingarnir eru spentir

**Víkingur**
Postsmoga 58
FO-520 Leirvík
www.vikingur.fo

**STOVNAÐ**
14. januar 2008

**FORMAÐUR**
Páll Gregersen

**MEISTARAR**
Ongantíð (GÍ hevur verið føroyameistari 6 ferðir)

**STEYPAVINNARAR**
Ongantíð (GÍ hevur verið steypavinnari 6 ferðir)

**GREIPUVINNARAR**
Ongantíð (GÍ hevur vunnið greipuna 2 ferðir)

**Í BESTU DEILDINI**
(2 ár)
2008-

**Í EUROPA**
Ongantíð (GÍ hevur spælt í Europa í 12 førum)




Sterki lokali bulurin er grundarlagið undir Víkingi. Her er Símun Louis Jacobsen í dysti móti grannunum úr ÍF

Mynd: Álvur Haraldsen

## Samansetta liðið hjá leirvíkingum og gøtumonnum tykist hava góðar fyritreytir at vera við í kappingini um heiðursmerkini

Víkingur er ítøkiligt dømi um, at tað kann spyrjast gott burtur úr fusión. Í fjør høvdu leirvíkingar og gøtumenn fyri fyrstu ferð ábyrgdina av felags liði, og tað hilnaðist væl. Víkingur var leingi við í kappingini um heiðursmerkini, men so leyp ketan av, og liðið endaði á fimta plássi.

Tað er nógv, sum bendir á, at pílurin í ár fer at venda rætta vegin. Ofta hevur tað víst seg, at samanløgd feløg hava havt trupulleikar við samleikanum. Soleiðis er tað ikki í Gøtu og Leirvík. Fólkið stendur fult og heilt aftanfyri flaggskipið, og leiðslan hevur púra greitt boðað frá, at tað verður ikki farið aðra staðni at fiska eftir spælarum. Tað verður dúvað upp á lokala samleikan, og harvið er tað upp til ungu menninar í Gøtu og Leirvík at vísa, hvør dugur er í teimum. Leiðslan í felagnum hevur í hvussu so er við sínum fráboðanum undirstrikað, at teir fara at fáa møguleikan.

Tá ið kagað verður at spælaralistanum, so er skjótt at staðfesta, at talan er um yvirgongds skipan, har onkrir teirra, sum eru komnir aðra staðni frá, og sum hava víst seg at trívast í Sarpugerði, fáa møguleikan. Hesir eru fíni málverjin Geza Turi, miðverjin Niclas Niclasen, miðvallarin Áslakur R. Petersen og álopsspælarin Zoltan Bukszegi.

Teir, sum vóru við til at manna fyrsta felagsliðið, hava verið við í fyrireikingunum til nýggja kappingarárið, og aftrat teimum er komin ein gamal kenningur í Gøtu. Eftir fótbóltsrundferð á flatlondum og í høvuðsstaðnum er Súni Olsen aftur í Sarpugerði, har fótbóltsevnini aftur skulu brúkast optimalt.

Serligan ans vakti tað í heyst, tá ið tað gjørdist greitt, at Jógvan Martin Olsen eftir drúgva og trúgva tænastu hjá FSF nú skuldi vera venjari í Sarpugerði. Millum teir, sum Jógvan Martin roknaði nógv við á landsliðnum, var Súni Olsen. Í fjør spurdist lítið burtur úr tí samstarvinum. Nú eru møguleikar fyri tí, og nýggi Víkinga venjarin roknar nógv við evnaríka miðvallaranum.

Aðrir lyklaspælarar eru Andreas Lava Olsen, sum alt oftari vísir seg at vera vandamiklasti álopsspælarin í landinum, Atli Gregersen, miðvallarin Sølvi Vatnhamar, brøðurnir Sam og Sverri Jacobsen, Símun Louis Jacobsen og Magnus Skoralíð. Og so eru tað fleiri ungir spælarar, ið rættiliga spíla seg út fyri at sleppa framat, og sum eru næsta ættarlið frá gyltu níti árunum. Millum hesar eru Martin Olsen, Finnur Justinussen og Bárður Hansen.

### Hópurin hjá Víkingi:

**MÁLVERJAR**
Géza Turi
Rógvi Ryggshamar (Áður spælt við LÍF, ÍF)

**VERJA**
Atli Gregersen (Frem)
Niclas Niclasen (KÍ)
Hanus Jacobsen (AB)
Hans Jørgin Djurhuus
Kaj Ennigarð (KÍ)
Hjartvard Hansen

**MIÐVØLLUR**
Áslakkur R. Petersen (ÍF)
Bárður Hansen
Sølvi Vatnhamar
Sverri Jacobsen
Sam Jacobsen
Súni Olsen (Zwolle, AaB, B36)
Símun Louis Jacobsen
Kaj Leo í Bartalsstovu

**ÁLOP**
Magnus Skoralíð
Andreas Lava Olsen
Finnur Justinussen
Zoltán Bükszegi (Vasa FC KFT)
Martin Olsen

**TILGONGD**
Súni Olsen, B36
Rógvi Ryggshamar, ÍF
Jógvan Martin Olsen (venjari) Føroyar
Trygvi Mortensen (venjari), KÍ

**FRÁGONGD**
Adrian Stauss, KÍ
Anton Skoradal (venjari), NSÍ
Mortan Joensen, Givin
Poul Ennigarð, ÍF
Poul Arni Jacobsen, B36

**VENJARI**
Jógvan Martin Olsen

**HJÁLPARVENJARI**
Trygvi Mortensen

**MÁLMANSVENJARI**
Pauli Jarnskor


